Kommunufelagið

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Gongin 7
Postboks 377
110 TÓRSHAVN

Dagfesting
20. mai 2018

Okkara j.nr.
18/01790-3

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr.
18/00134-6

**Viðv. uppskoti til kunngerð um stuðul til ferðavinnumenning**

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur 01.05 2018 sent Kommunufelagnum uppskot til *Kunngerð um stuðul til ferðavinnumenning* til hoyringar.

Endamálið við uppskotinum er at skipa tann partin av stuðlinum, ið kann verða latin til vinnuligar verkætlanir innan ferðavinnuna. Sambært tilmælinum frá arbeiðsbólkinum verður talan um 2,75 mió. kr. Harafturat verða aðrar 2,75 mió. kr. sambært sama tilmæli latnar til verkætlanir, sum VFI varðar av saman við eitt nú kommununum. Vit ganga út frá, at vit í næstum fáa at vita, hvussu hesin parturin av stuðlinum verður umsitin og skipaður.

Sambært § 2 skal VFI á hvørjum ári gera eina ætlan fyri ferðavinnumenning í Føroyum. Í menningarætlanini skal nágreinast, hvussu menningararbeiðið verður skipað og hvørjar ætlanirnar eru við stuðlinum. Ætlanin verður latin landsstýrismanninum í desember mánaði. Kommunufelagið mælir til, at hendan ætlan verður almenn longu í september, soleiðis at kommunurnar hava møguleika at gera tillagingar í sínum egnu fíggjarætlanum, um so er, at øki, ið hava teirra áhuga, verða raðfest.

Kommunufelagið hevur ikki aðrar viðmerkingar til uppskotið.

Vegna
Kommunufelagið

Dennis Holm
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**